# Gestir við gestum í Norðurlandahúsinum



Leygarkvøldið 26. august skipa Gestir saman við Norðurlandahúsinum fyri eini heilt serligari konsert í stóra salinum. Á palli vera The Story Ends, Kári Sverrisson. Høvuðsvertirnir eru tó Gestir

Kári Sverrisson er í hesum døgum er í ferð við at gera komandi fløgu lidna saman við Hans Jacob Kollslíð.

Á G! Festivalinum í summar gav The Story Ends sína fyrstu fløgu út, eins og Gestir á sama festivali gav út sína nógv eftirbíðaðu fyrstu fløgu.

Fyrr í ár vóru Gestir við á stóra AME tiltakinum í Reykjavík, og kláraðu teir seg frálíka væl. Hesaferð verður eisini talan um eina serliga konsert hjá bólkinum, áðrenn Gestir fer niður til Keypmannahavnar 30. septembur at royna seg sum tónleikavertir á Bryggjuni.

Í Norðurlandahúsinum fer Gestir at hava selloleikaranum Tóra Restorff Jacobsen afturat sær á palli, og fer stóra løriftið at verða nýtt.

Konsertin byrjar kl. 19.30, Atgongumerki fáast í forsølu í kunningarstovuni í Rúnavík og Havn og í Norðurlandahúsinum.

**nud**





Vilt tú stjórna havnunum í Runavíkar kommunu ?

*Runavíkar Havn er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss. Árliga vitja uml. 1.600 skip og bátar havnirnar í Runavíkar Kommunu. Havnin er soleiðis ein týðandi tænastudepil fyri sjóvinnuna. Seinnu árini hava ferðamannaskip eisini vitjað Runavíkar Havn, og hetta økið ynskja vit eisini at menna framyvir.*

*Til at leiða og menna havnina víðari, sum ein tænstudepil fyri skip, bátar og aðrar brúkarar, verður søkt eftir*

## Havnarstjóra
***Til Runavíkar Havn***

Havnarstjórin er umsitingar- og rakstrarleiðari, og hevur ábyrgd fyri at stýra virkseminum hjá Runavíkar havn innan galdandi karmar og reglur. Havnarstjórin skal vísa ágrýtni í arbeiðinum við at menna havnirnar í Runavíkar kommunu til at lúka krøv og ynskir, ið brúkarar, myndugleikar og aðrir aktørar hava.

Arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Av ymisku arbeiðsuppgávunum kunnu nevnast:**
* Leiða, samskipa og effektivisera virksemi innan politiskar og búskaparligar karmar.
* Motivera hini starvsfólkini, og skapa samvilja um mál og amboð.
* Syrgja fyri yvirordnaðari planlegging, fíggjarstýring, og virksemismetingum annars.
* Skipa tænastuvirksemið mótvegis verandi og framtíðar brúkarum av havnunum.
* Samstarva við avvarðandi myndugleikar.

**Ynskiligir førleikar:**
* Hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu.
* Innlit í fíggjarlig viðurskiftir.
* Góðan kunnleika til avbjóðingar og ynskir hjá sjóvinnuni.
* Góðar málsligar førleikar, serliga á enskum, bæði í skrift og talu.
* Dugir væl at orða seg, bæði munnligt og skrivligt.
* Teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.
* Viðkomandi royndir innan sjóvinnu.
* Hægri viðkomandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar:**
Sum persónur vænta vit, at tú ert neyvur, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samskifta og samstarva. Víðari vænta vit, at tú hevur eitt mennandi lyndi, ert fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innan- og uttanhýsis.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

**Umsóknin:**
Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin **07. September 2006** til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará, tlf. 417000. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til borgarstjóran.

www.runavik.fo


# Eyðun fer til Havnar

Eftir frálíku framførsluna í Klaksvík á Summarfestivalinum saman við Terja, fer Eyðun Nolsøe við bandi á pall í Rex Culture Club í Havn hetta vikuskiftið.

Møguleiki verður uttan iva fyri at hoyra øll Frændur hittini og løg sum Jalousi og Dansa. Eyðun hevur altíð verið virkin tónasmiður, og tað er ikki ósannlíkt, at okkurt nýtt eisini verður á skránni, nú søgur um eina nýggja fløgu við Eyðuni Nolsøe hava verið at hoyrt í fleiri mánaðir.

Eyðun Nolsøe Band spælir í REX fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

**nud**


